# VIKULIÐIÐ

deildin VIKA 41




Uppstilling: **4-4-2**



*Stjørnuleikararnir leiktu í serligum bróstkrabba troyggjum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Brauer gekk fremst

**HONDBÓLTUR** Neistin og Stjørnan fingu tvey stig aftur at í skjáttuna í gjár

Hilmar Jan Hansen

Kvinnurnar hjá Neistanum vunnu í gjárkvøldið við seks málum á Tjaldri í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, og í Klaksvík var munurin bara fimm mál, tá Stjørnan vann á Kyndli.

Longu miðskeiðis í fyrra hálvleiki í dystinum millum Neistan og Tjaldur fór heimaliðið framum og helt fast um leisðlψuna, sum at enda bar sigurin við sær.

Neistin vann 30-24, eftir 16-12 í hálvleikinum.

Serliga var Barbara Brauer ein marra fyri verjuna hjá Tjaldri, tí hon skoraði ikki færri enn 15 av teimum 30 málunum hjá Neistanum.

Hjá Tjaldri var Adina Petra toppskjútti við 11 málum.

## Góvu Stjørnuni mótstøðu

Í Klaksvík tók Stjørnan móti Kyndli, og tað úrsliti kundi eisini bent á, at Sunset-kappingin hjá kvinnum í vetur verður javnari, enn hon hevur verið undanfarnu árini.

Stjørnan vann, sum væntað, men sigurin var ikki so sannførandi, sum hann mangan hevur verið. Úrslitið varð 32-27 til Stjørnuna, sum var á odda 17-15 í hálvleikinum.

Serliga í byrjanini bjóðaði Kyndil væl av og var eitt skifti á odda 7-2. Eitt skifti í seinna hálvleiki var bara eitt mál á muni, men ímóti endanum hevði Stjørnan størri orku og vann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## **Stjørnan - Kyndil** 32-27 (17-15)

Dómarar: Sámal Paulason og Kári Hansen

**10 min.: 4-7**
**20 min.: 10-11**
**40 min.: 20-21**
**50 min.: 26-25**

**Stjørnan:** Valentina Suciu 10, Anna Kristina Samson 7, Durita Christophersen 4, Durita Ljósstein 4, Nicoletta R. Hansen 3, Judit Hansen 2, Una Olsen 1, Durita Mikkelsen 1.
Venjari: Svein Rógvi Nielsen
**Kyndil:** Heidi Maria Akselsen 5, Randi S. Wardum 4, Jórun Ludvig 4, Linda W eihe 4, Turið Arge 3, Guðrið G. Eystberg 3, Rannvá Carlson 2, Súsanna Petersen 2.
Venjari: Geir Wardum
Útvísingar: Stjørnan 3 – Kyndil 4

## **Neistin - Tjaldur** 30-24 (16-12)

Dómarar: Rúni og Ragnar Simonsen

**10 min.: 5-5**
**20 min.: 12-9**
**40 min.: 21-14**
**50 min.: 26-18**

**Neistin:** Barbara Brauer 15, Jacklin Durhuus 6, Bára Hansen 3, Birita Wardum 2, Marjun Damberg 1, Sandra Bahanova 1, Katrin á Neystabø 1, Rakul Magnussen 1.
Venjari: Birgir Hansen
**Tjaldur:** Adina Petrea 11, Cornelia Holca 7 (2), Simona Petersen 3, Benadikta Johannesen 2, Annika Thomsen 1.
Venjari: Bogdan Bucea
Útvísingar: Neistin 3 –Tjaldur 6



*Mynd: Álvur Haraldsen*